# FØROYSKUR DANSUR

Álit um

dans og

kvøðing

í

skúlanum

# FØROYSKUR DANSUR

Álit um dans og kvøðing í skúlanum

# Innihaldsyvirlit

Inngangur . . . . . . . . . . 7

Føroyskur dansur . . . . . . . . . . 11
Dansur í dag . . . . . . . . . . 11
Hin góði dansurin . . . . . . . . . . 13
Leikur og framførsla . . . . . . . . . . 15
At lurta eftir dansi . . . . . . . . . . 17
Sitandi kvøðing . . . . . . . . . . 18
Skiparin . . . . . . . . . . 20
Upplæring . . . . . . . . . . 22
Dansistovan, almennur dansur, dansifeløg . . . . . . . . . . 25
Samanfating . . . . . . . . . . 27

Kanning um dans og kvæðir í skúlanum . . . . . . . . . . 28

Tilmæli . . . . . . . . . . 32
Krøv til undirvísingina . . . . . . . . . . 33
Hylling á dansi og kvøðing . . . . . . . . . . 33
Duga stev . . . . . . . . . . 34
Uttanatslæra . . . . . . . . . . 34
Upp á gólv . . . . . . . . . . 34
Barnadansur og tvíbýtt undirvísing . . . . . . . . . . 35
Føroyskur dansur í undirvísingini . . . . . . . . . . 35
Ábyrgd og skipan . . . . . . . . . . 36
Fíggjarkrøv . . . . . . . . . . 36
Lærararnir . . . . . . . . . . 37

Uppískoyti . . . . . . . . . . 38
Hugskot til kvæðir, vísur, tættir, rímur o.t. ið kann hóska hjá næmingum. . . 38
Føroyskir sangir yrktir til kvæðaløg . . . . . . . . . . 39

# Inngangur

Dansifólk, lærarar og onnur við áhuga hava í fleiri ættarlið tosað um at varðveita hin føroyska dansin. Í fimtiárunum og seinni var í mong ár barnadansur í Havn, fyriskipaður av monnum, ið gjørdu hetta av sínum eintingum og av eldhuga, og í Norðurlandahúsinum hevur Havnar Dansifelag havt barnadans nú í mong ár, har nógv børn dansa um vetrarnar. Eisini hetta tiltak verður fyriskipað av eldhugaðum dansifólki fyri einki. Í fleiri bygdum hevur eisini verið skipað fyri barnadansi av og á. Í summum førum av lærarum og viðhvørt av dansifeløgum og dansihugaðum fólki annars.

Eldri skrivaðar heimildir um føroyskan dans hava allar lyndi til at halda, at dansinum veit illa við, at "nú" er hann í afturgongd og líkist ikki afturat, hvussu dansað varð "fyrr". Her skal bara verða víst til Jóannes í Króki á Sandi, sum í endurminningum sínum skrivar um dansin og kvæðini, hann skrivaði upp eftir áheitan frá próst Hentze:

> "Samme aar (t.e. 1819) var han (Hentze próstur) blevet anmodet om fra Canceliet at indsamle saa mange af de gamle Færøiske qvæder som mueligt kunde vere. Til denne tieneste bad han ogsaa mig. Mange havde jeg vel tilforn selv lært, og de andre sankede jeg til fra adskillige gamle mend her om heele sysselet, indtil antallet af saadanne oversteg ethundrede hvis vers i det hele oversteg titusinde, og som for det meste atter [blev] igientaget efter revisor J. Nolsøe hans forlangende, hvoraf jeg ogsaa selv beholdt copie ikke for min skyld, men for den efterkommende ungdom, at de kunde see hvad fortidens ungdom havde til fornøielse at qvæde i deres dandstid, i stedet for at ungdommen saa lidet ved om disse,

da de nesten vare gangne ud af brugen, men ungdommens fornøielse nu mest bestod i at drikke brendeviin og synge skiøgeviiser." [1]

Ein høvuðsgrundin hjá teimum leikmonnum, ið skrivaðu kvæðir upp fyrra part av farnu øld, er nettupp henda sama, at tey ungu duga ikki longur kvæðir, og at við dansinum gongur mangastaðni stórliga afturá. Javnan kemur hesin spurningur upp í blaðkjaki, og í 1908 skrivar Sverre Patursson sín lítla bókling um, hvussu góður dansur eigur at dansast, tey lýtir, ið hava trokað seg inn í dansin, og sum eiga at beinast burtur aftur[2]. Spurningurin um dans í skúlunum verður nevndur av og á, og í 1924 nevndi Jóannes Patursson á tingi, at føroyskur dansur átti at verið tikin upp innan skúlans gátt. Árið eftir - í 1925 - skrivar Jóhan Kallsoy grein[3] um evnið. Eisini hann vísir til afturgongd fyri føroyskan dans og kvøðing, og mælir til sum niðurstøðu, at taka hugskotið hjá Jóannesi Patursson upp í álvara.

Í 1954 varð fyrsta dansifelagið í Føroyum stovnað. Tað var Havnar Dansifelag. Stigið til at stovna hetta felag varð tikið av nøkrum fáum fólkum, ið sótu á balkongini í Sjónleikarhúsinum og lurtaðu eitt mánakvøld við føroyskum dansi. Tá var mánakvøld fast dansikvøld til føroyskan dans fram til 1976. Ofta var so at siga ikki dansandi har fyri roki og ófriði, fullum fólki, útlendingum og øðrum, ið hvørki dugdi stev ella kvæðir, tó at mangar góðar stundir eisini vóru í Sjónleikarhúsinum. Knappliga kom onkur við hugskotinum at skipa eitt felag fyri áhugað, so tey fingu sámiligar umstøður at dansa, og sama kvøld varð farið heim til ein av hesum, og felagið varð stovnað. Stutt eftir fóru dansifeløg at taka seg upp víða hvar, og ikki minst millum hesi fólk hevur tosið um dans í skúlunum staðið við.

Føroysk dansifeløg hava leingi verið uppi í norðurlendskum dansifelagssamstarvi og verið við á dansistevnum víða um í Norðurlondum.

---

1 M. A. Jacobsen: Jóhannes Klæmintsson í Króki. Varðin bd. 9, 1929

2 Sverre Patursson: Nøkur orð um hin føroyska dansin, Tórshavn 1908.

3 Jóhan Kallsoy: Hin føroyski dansurin á gravarbakka - stendur honum til bata? Í: Varðin bd. 5, 1925.

Eisini í hesum sambandi kemur spurningurin um undirvísing m.a. í skúlunum javnan upp.

1. juni 1988 varð boðið til fund um evnið "føroyskur dansur í skúlanum". Fundurin varð hildin á Føroyamálsdeildini. Stigtakari var Jógvan Heinesen. Til henda fund vórðu boðin fólk, ið á ymsan hátt kundu hugsast at hava áhuga fyri evninum. Til staðar vóru Signar Hansen, løgtingsmaður, Eyðun Andreassen og Eivind Weyhe á Føroyamálsdeildini, Hensar Ellingsgaard, landsskúlastjóri, Øssur av Steinum og Jógvan Heinesen. Onnur vóru boðin, men høvdu ikki høvi at koma. Á fundinum skeyt Signar Hansen upp at biðja landsstýrið heita á Landsskúlafyrisitingina um at seta eina nevnd at viðgera spurningin og koma við einum áliti. Hesum tók fundurin undir við, og Signar skuldi tosa við Jógvan Durhuus, landsstýrismann í skúlamálum, og heita á hann um at fáa nevndina setta. Tað gjørdi hann, og 18. oktober varð nevndin sett við bræví frá Hensar Ellingsgaard, landsskúlastjóra. Uppgávan hjá nevndini er orðað soleiðis:

> "Við heimild í løgtingslóg nr. 58, dagfest 2. oktober 1978, um skúlafyrisiting gr. 6 og eftir áheitan frá Føroya Landsstýri hevur landsskúlastjórin gjørt av at seta nevnd, hvørs setningur verður at taka upp spurningin viðvíkjandi teirri støðu, føroyski dansurin hevur í samfelagi okkara, og at koma við tilmæli um eina ábótarætlan. Hvussu hon eigur at verða skipað og framd í verki, so at kvæði og føroyski dansurin aftur verða ein sjálvsagdur táttur í mentunarlívi okkara."

Í hesi nevnd hava sitið:
Eyðun Andreassen, formaður,
Eivind Weyhe,
Hensar Ellingsgaard,
Ása Magnussen, skrivari til 19. okt. 1991, og
Heðin M. Klein.

Ása Magnussen segði seg úr nevndini 19. oktober 1991, og hevur formaðurin røkt skrivarauppgávuna síðan tá.

Nevndin hevur havt fleiri fundir og fingið áhugað fólk ymsastaðni úr samfelagnum at leggja síni sjónarmið fram um føroyska dansin, framtíð

hansara og um dans í skúlanum. Fundir hava verið við álitisfólk úr dansifeløgum um alt landið, við áhugaðar lærarar, ið leggja dent á føroyskan dans í sínum arbeiði, barnagarðslærarar og ymisk onnur.

Eyðun Andreassen hevur skrivað tekstin í álitinum í samráð við hinar nevndarlimirnar.

Tórshavn tann 21. november 1994

Hensar Ellingsgaard | Heðin M. Klein

Eivind Weyhe | Eyðun Andreassen

# Føroyskur dansur

## DANSUR Í DAG

Støðan í dag er tann, at almennur føroyskur dansur so at siga ikki kemur fyri uttan í undantaksføri. Dansurin er endaður í dansifeløgum fyri serligt áhugað fólk. Verður skipað fyri almennum dansi, verður ofta eitt dansifelag biðið um at luttaka, eyðvitað av tí grund at annars verður ov lítið fólk, ið dugir at dansa og kvøða.

Tað hevur verið vanligt at siga, at allir føroyingar duga stev, men tað er ivasamt, um hetta er galdandi longur. Nógv ung duga ikki væl stev og lítið og onki at kvøða. Dansihøvir eru fá, og tað er ein sannroynd, at ungfólk koma lítið í dansifeløgini, har miðalaldur limanna er heldur oman fyri enn niðan fyri tey hálvthundrað. Tey ungu siga sjálv, at tey kenna seg ikki væl í dansifeløgunum, at tey kenna tað, sum duga tey ikki nóg væl og bara gera fortreð. Tey siga seg ikki fáa gott samband við tað tilkomna fólkið, ið har dansar. Hetta siga eisini ung fólk, ið annars hava góðan dansihug og duga fitt at kvøða, og tey halda seg tí aftur. Hjá ungfólki, ið kanska er minni vant við dans og kvøðing, men vil royna, er støðan rímiligt ikki betri.

Í dag eru eini 13 dansifeløg í Føroyum. Øll, ið vilja, sleppa at dansa í dansifeløgunum, og dansifólkið har er fyrst at viðganga tað harmiliga í, at lítið av ungum fólki gongur í feløgini. Hví hetta er so, eru eyðvitað fleiri grundir til, men beinast er at siga beinanvegin, at onki dansifelag er fegnari, enn um nógv ungt fólk er uppií.

Ein orsøk til, at so fá ung dansa í dansifeløgunum, er at finna í aldursmuninum. Hjá summum ungum kennist tað lítið áhugavert at dansa eitt ella bara heilt fá saman við so nógvum gomlum fólki. Ungfólk í kæti og veitslulag hava ikki sama lag sum eldri meira friðarligt fólk, og

tann ævinligi spenningurin millum ungfólk, um ein so kann siga, fær onki rásarúm undir teimum formum, tey ungu møta í dansifeløgunum.

Atferðarhátturin hjá ungum nú á døgum er ov kontantur og útfarandi til at hóska væl í einum dansifelag í dag. Ivaleyst er atferðarmunurin millum ættarliðini størri í dag enn nakrantíð, og ungfólk nú á døgum hava ikki serliga sterkar konventiónir um at skula fjala sín atburð í virðing fyri eldri ættarliðum: Teirra atferð og prát skal ikki víkja fyri teimum eldru eins og á bygd eitt ættarlið herfyri. Hetta kann eins væl vendast við, tí var eitt dansifelag fyri ung, har ungdómurin setti dámin innanveggja, hevði tilkomið og eldri fólk kanska aftrað seg við at fara í dans í tí felagnum. Ungdómur í dag gevur seg ikki til tols við, at bara tey eldru skula seta dám á. Her er bara at ásanna, at tí gomlu uppalandi funktiónini, sosialiseringsfunktiónini - at ung taka eftir eldri sum fyridømi - er lítið grundarlag fyri í samfelagnum í dag, og tí sjálvsagt heldur ikki í tí føroyska dansinum. Hugburðurin í dag er broyttur soleiðis, at vitan og medferð skula doserast, har áður varð tikið eftir fyridømi frá eldri. Og so má sjálvsagt eisini vera í dansinum.

Mentanarmunur er eisini millum ættarliðini í aðrar mátar í mun til kvæðir og dans. Tað er valla hugsandi, at tann identifikatión við persónarnar í kvæðunum, fólk hevði fyrr, á sama hátt kann vera aktuell hjá ungum fólki í dag. Møguliga er her ein avgerandi orsøk at finna til at kvæðini ikki tykjast dagsins ungdómi eins hugtakandi og fyrr. Kvæðastílurin, hendingarnar og persónslýsingarnar í serliga teimum eldru kvæðunum tykjast kanska ungum fólki óskiljandi og stundum patetisk og fremmand. Tey hava tí ikki fortreytir fyri at liva seg inn í kvæðini og identifisera seg við persónar og hendingar, sum fólk hevði fyrr, halda tey. Tað loðar nakað gamaldags og "moðið" uppi við kvæðunum í dag, og tað kann bara vera ein uppgáva hjá skúla og øðrum at lata upp fyri kvæðunum á ein annan hátt og við undirvísing geva ungum fólki eina aðra mynd enn hesa, ið líkasum liggur og sveimar einastaðni uppiyvir í samfelagnum.

Á hin bógvin er støðan tann, at børn og ung í grundini hava ógvuliga góðan dansihug, men hann má hjálpast fram á onkran hátt. Nógv børn vísa stóran áhuga fyri barnadansi, har skipað verður fyri honum,

og lærarar eru samdir um, at børn eru sera fegin um at sleppa upp á gólv, tá ið tað - aloftast hendingaferð - verður givið teimum høvi til tess í skúlunum.

Tað tykist ikki at vera so, at børn og ungfólk, ið veruliga fáa høvi at kunnast við kvæðir, vísa hesum skaldskapi frá sær. Hin nevnda hugmyndin um kvæðini, dansin og alt, sum hartil hoyrir, sum "gamaldags" og "moðin", er eftir øllum at døma ein ideologiskt ella agitatoriskt funderað forðing, íkomin onkuntíð í 50- og 60-árunum ella fyrr, sum legitimering fyri "modernitetinum" í tí nýggju ungdómsmentanini og sum slóðari fyri tí rytmiska musikkinum, meðan ein ávís tvístøða enn var til í teimum ungu ættarliðunum.

## HIN GÓÐI DANSURIN

Føroyskur dansur hevur, sum allir mentanarligir formar, ávísar ytri og innari umstøður, ið treyta hann. Eru tær í ólagi, ávirkar tað dansin, og broytast umstøðurnar nógv, broytist eisini dansurin. Tað er hent í Føroyum í okkara tíð.

Um alt landið hevur gjøgnum tíðirnar verið dansað meira og minni. Dansilagið hevur lagað seg ymiskliga frá bygd til bygd. Framvegis er bygdamunur, tó dansur, eins og so mangt annað í okkara samskiftistíð, er um at missa síni skiftandi eyðkennir og gerast líkur allastaðni.

Tær ytru umstøðurnar eru tann samfelagsligi og mentanarligi karmurin um dansin. Er lagið alment soleiðis í samfelagnum, at tað birtir upp undir dansin? Hóskar hann til í samfelagsmenningini? Eru lívstreytirnar og lívskrøvini í bygdunum soleiðis, at dansurin hóskar? Kunna formur og innihald í dansi- og kvæðatraditiónini siga fólkinum so nógv, at tað gevur meining at dansa?

Dansurin er vaksin fram og hevur lagað seg við stabiliteti í bygdalívinum sum eini týðandi treyt og hevur, tykist tað, trivist best, har lagið frá tí gamla samfelagnum í Føroyum hevur staðið við longst. Við fast samansjóðaðum gerandisdegi, har hvør gjørdi sítt í einum aldargomlum arbeiðsbýti millum bøndur og ognarleys, millum mannfólk og konufólk, millum útiarbeiði og inniarbeiði og so framvegis árið í ring. Hetta var

ytri karmurin um dansin, ið tá var fastur partur í tí stabila gerandislívinum og fastur, natúrligur táttur í høgtíðslívinum.

Her kennist dansifólkið ikki einans úr dansinum, men úr øllum vasi við. Mannin, tú kvøður saman við í kvøld, kennir tú, tit arbeiða saman, kenna muru og medferð, hvør kennir umstøðurnar hjá øðrum. Dansifólkið tosar sama mál í víðastu merking, hevur so nógvar felags lívsroyndir, kennir áskoðanirnar hvør hjá øðrum og lívsleiðina alla. Hesin ytri karmurin býr undir og treytar tað samskifti, ið krevst til góðan dans.

Dansurin verður góður, tá ið ytri og innari umstøður fella so í lag, at dansurin líkasum kemur upp á eitt hægsta stig av samljóði og samskifti, har lagið og formurin smelta saman í eina heilskapta eind, og dansifólkið upplivir kropsliga og kensluliga eind í dansinum og kvæðnum. Hetta kann eisini sigast soleiðis, at tá ið dansurin er góður, falla orð og innihald í kvæðnum saman í rytmu og variatión, lagi og stevi.

Hvat er so góður føroyskur dansur? Sagt verður eisini, at dansurin gongur væl. Dansifólk eru ikki í iva um, hvat hetta merkir, men tað kann vera trupult at finna orð at siga fyri øðrum. Hevur tú ikki ans fyri dansinum, nyttar lítið at greiða í orðum frá tí góða og hugtakandi við honum, men fleiri beinraknar lýsingar eru:

> "Føroyski dansurin, soleiðis sum hann verður troðin í einari trongari skýmligari stovu, einsljóðandi í stevinum, tungur og dynjandi, kann tykjast mongum einsljóðandi og keðiligur. Men tey, ið kenna dansin, eru hugtikin av honum. Júst við endurtøkuni, niðurlagnum, ið kemur aftur og aftur, teimum somu kendu andlitunum, ið alsamt fara framvið, hevur hann sína stóru, ofta manandi styrki. Soleiðis sum hann við tíðini hevur legnað seg í Føroyum, hevur hann fingið nakað við sær av havsins veldigu dandandi rytmu. So sum havið í regluligari takt tungliga skolar inn yvir klettarnar og dregur út aftur í støðugt einsljóðandi sangi av túsund smáum søltum streymum, soleiðis aldar eisini kvæðaframførslan, alsamt brotin av tí einsljóðandi niðurlagnum.
>
> Henda skýmliga stovan, har milt, gult ljós úr koluni glampar yvir veðurbard mansandlit, mjúkar unggentukinnar, hetta villa kórið av kvøðandi røddum, tað eru Føroyar - myrkrið, brimið, stormurin. Tað er hitt ógvisliga og samstundis

undrunarvert næra, tað er hin stórfingna frásøgnin og blúgva yrkingin, tað hevur verið føroyinga mentunarbragd at varðveita í aldargomlum búna upp í okkara tíð."[4]

Soleiðis skrivar Jørgen-Frantz Jacobsen í 1927 um føroyska dansin. Onnur hava málborið seg á líknandi hátt í royndum at finna orð, ið kunna siga, hvat tað er at dansa føroyskan dans.

## LEIKUR OG FRAMFØRSLA

Føroyskur dansur er leikur og framførsla. Við orðum, tónum og stevi verður ein søga søgd í ringinum. Dansararnir halda hvør í hondina á øðrum og dansa í ringi við bakinum úteftir og andlitinum inneftir, og har verður søgan søgd. Dansifólkið kennir gongdina í tí, sum kvøðið verður, tey duga uppií, ella tey duga alt kvæðið. Øll bæði kvøða og lurta, hoyra og siga frá tí vælkendu søguni enn einaferð. Og meira enn bara tað: Inni í ringinum verða hendingarnar í kvæðnum endurskaptar, so tær fara fram fyri eygunum á dansifólkinum. Dansararnir eru á stríðsvalinum ella inni í borgarstovuni, tey frøast saman við tí sigrandi hetjuni og harmast tey óeydnusomu elskandi og teirra hørðu lagnu. Dansararnir standa hjá, tá ið risin fellur, og teir standa á skipabunka í illveðri og í hørðum bardaga. Teir eru hjá, tá ið hetjan fær sína løn og fíggindin sína uppibornu revsing.

Hjartatátturin í føroyska dansinum er at finna mitt innan í ringinum. Dansurin ringir seg um tað, ið er egni kjarni hansara. Dansifólkið vendir bakinum úteftir móti umheiminum og byggir mark millum eitt kaos, ið er uttan fyri ringin, og eitt kosmos inni í ringinum, har persónarnir í kvæðunum og vísunum eru íbúgvar í tí universi, dansifólkið manar fram ta løtuna, dansurin gongur. Inn í hetta univers slepst ikki uttan at bróta ringin, fara uppí og dansa við.

Dansurin hevur sína kensluligu gongd, ið dansifólkið gjøgnumlivir saman, har samskiftið millum hvønn einstakan, ið nú er staddur á tí somu arenu, sum hendingarnar í kvæði ella vísu fara fram, verður borið av

---

4 Jørgen-Frantz Jacobsen: Tekster til den færøske Folkevise-dans. København 1927 (EyA týddi úr donskum).

persónligari kommunikatión og beinleiðis sambandi í tí inneftirvenda dansiringinum við felags kunnleika til hendingarnar, við identifikatión við persónarnar og gjøgnum tann samansetta rytmiska pulsin í dansinum, ið er skaptur í samanrenning millum ørindislag, dansistev og rytmu í kvæðalagnum.

Í einum stórum dansiringi verður sjáldan góður dansur. Bestur er dansurin, tá ið dansararnir eru so fáir, at teir við hóskandi millumbili dansa fram við hvørjum øðrum aftur og aftur. Tá kemur tað intensa samskiftið upp við rytmuni, rørslunum og tí hugtakandi innihaldinum, ið steingir alla ávirkan uttanífrá úti og heldur dansifólkinum føstum í ringi og kvæði.

Øll sleppa upp í føroyskan dans, tá ið tey vilja. Tey, ið standa og hyggja at harafturímóti, tey hoyra hesa løtuna til í kaos uttan fyri ringin, við ongum møguleika til at fáa samband við dansifólkið og tað, ið hendir inni í ringinum - inni í kosmos. Tey kunna væl fylgja við kortini, liva við í tí, sum fyriferst á gólvi.

Ikki fyrr enn niðurlagið til seinasta ørindi er kvøðið, verður ringurin brotin, og upplivingin er av. Nú er dansifólkið aftur í dansistovuni saman við teimum, ið ikki vóru uppi í ringinum hesaferð.

Thorkild Knudsen er beinrakin í lýsing síni av føroyskum dansi:

> "Øll taka undir við niðurlagnum, og kvøðingin verður ógvuslig og fangandi, hvørja ferð niðurlagið aftur og aftur sum ein av havsins bylgjum reisist og skolar gjøgnum dansistovuna. Tá fær skiparin høvi til at umhugsa og fyrireika næsta ørindi, so hann fær ført hendingarnar víðari á rættan hátt. Breiddin í hendingagongdini er somuleiðis týðandi fyri dansifólkið. Skula øll kunna uppliva innihaldið og fáa borið tað fram í dansinum, ber ikki til, at ov stutt verður gjørt burtur úr hendingunum. Hetjan doyr, kanska, og lívið fer víðari. Men ikki fyrr enn allur tann kensluspenningur, ið so øgiligar hendingar skapa, er loystur í dansinum. Føroyski dansurin hevur sína kensluligu gongd, og hetjan kann ikki lata sítt lív í einans ørindi: tíggju

ørindir, tjúgu ørindir, so kann hann fara". [5]

Um ein brúðardans í Skálavík skrivar Heðin Brú soleiðis í Endurminningum sínum:

> "Eitt brús av ljóði fylti stovuna. Sterkt og dragandi hugtók hetta gamla vísulagið tey dansandi og sameindi tey til eina heild, so allur hesin stóri dansiringur bar seg sum eitt livandi kykt. Veitslurámurin og hátíðin lýsti av øllum andlitum. Eg kendi, hvussu tann heiti felagsandi, ið hóast alt kegl er í hvørjari bygd, kom fram í skærasta lagi - hesin felagsandi, sum vit kenna so væl frá ófrættaløtum, gravarferðum, frá tilburðum, tá ið stendur um lívið."

## AT LURTA EFTIR DANSI

Fólkið, ið vanliga sat hjá í dansistovuni og lurtaði, fylgdi sera væl við í kvøðingini. Eitt nú tey gomlu, ið ikki orkaðu so væl at dansa. Ja, tey livdu við, man vera rættari at siga, tá ið dansurin var góður og gekk væl. Heðin Brú leggur dent á hesi gomlu, ið komu í dansistovuna at lurta:

> "Áðrenn eg sleppi bygdardansinum frá mínum ungu døgum, lystir mær at nevna hetta: Tað var ikki bert tey í bygdini, sum vóru við og dansaðu, sum høvdu gleði av dansinum, men góðveðurskvøld, tá ið dansurin gekk fyri opnum vindeygum og kvøðingin ljómaði út yvir bygdina, so gleddust tey sum heima sótu við, tey sum vóru barnabundin, tey gomlu sum orkaðu ikki upp í dansin, tey stóðu kanska fyri uttan og lýddu á, ella lógu fyri opnum vindeyga og lýddu á, so vit kunna siga, at øll bygdin gleddi seg yvir dansin.
>
> Eg minnist enn gamlar menn, sum litu sær ikki til at fara upp í dansin, teir raggaðu oman í dansihúsið, settu seg um eitt lítið borð í roykstovuni, spældu grevjass um kritstrikur,

---

5 Thorkild Knudsen: Arbejdsvise - dansevise. Í: L. Bødker (red.): Nordisk seminar i folkedigtning I, København 1962 (týtt úr donskum).

og vóru í góðum lag. Onkur ungur kom kanska og leskaði teir ein dropa viðhvørt, so vóru teir so hjartans glaðir at kenna, teir vóru ikki kastaðir upp um garðar, og tað var ikki rárt, at hesir gomlu, áðrenn teir á kvøldinum raggaðu aftur at húsum, sungu nøkur ørindi úr einum kirkjusálmi. Soleiðis var bygdarlívið tá."[6]

Einastaðni hevur Mortan Nolsøe fortalt eftir heimildarfólki, hvussu hugtikin tey gomlu, ið sótu hjá í dansistovuni, kundu vera av dansinum. Var skiparin góður, hendi tað seg, fortelur Mortan, at gamlir menn, ið sótu og lurtaðu, rivu grúgvusteinarnar leysar ella álaðu klæðini uttan av kroppinum, sum kvæðið leið. Ella tárini kundu renna teimum niður í tað síða skeggið um sorgarleikin í kvæðinum. Við slík høvir kundu tey gomlu meta tað næstan sum halgibrot, breyt onkur beint tá ringin og vildi uppí, heldur enn at vera standandi og lurta. Og hendi tað seg tá, eftir slíka hátíðarløtu, at onkur tók at skipa onkran lættisopp ella okkurt minni virt, kundu onkur av teimum gomlu krevja óvenjingin útkoyrdan.[7]

At duga at lurta var fyrr ikki hildið minni kynstrið enn at duga at siga frá - ella kvøða. At duga at lurta er ein grundarsteinurin undir allari munnligari traditión - ein treyt fyri, at føroyskur dansur og allur skaldskapur av manna munni livir.

## SITANDI KVØÐING

Dansur og serstakliga kvøðing vóru nógv brúkt aðrastaðni enn í sjálvari dansistovuni. Hin gamla kvøldsetan var eitt slíkt høvi. Hammershaimb lýsir kvøldsetuna í einari fólkalívsmynd og nemur millum annað við kvæðini og dansin. Hann skrivar:

"Og nú hurra rokkarnir, gnadda karðarnir, ringla stokkarnir, og arbeiðið er komið á gongd hjá øllum. Men orðtakið

6 Heðin Brú: Endurminningar, Tórshavn 1980.

7 Mortan Nolsøe: Folkevisa og folkevisemiljøet på Færøyene. Óprentað handrit.

> sigur: "Tungur er tigandi róður", so er alt strev og arbeiði tungt, tá ið ið einki annað er havt fram íhjá til gamans at stytta um tað strevnu tíðina. Tí er ikki tøgn í roykstovuni um vetrarkvøldini: nú verður kvøðið av bóndanum ella einum hvørjum húskalli, sum hevur gott mál og væl dugir at skipa tey longu kvæðini um Sjúrð Sigmundarson, Sigmund Brestisson, Gøtu-Trónd og aðrar fornar kappar, tá geva øll í stovuni ljóð og lýða á, meðan ið ørindið verður kvøðið, men taka við, tá ið kemur til niðurlagið í kvæðinum. Summir leggja sær í minni, hvat kvøðið verður, at læra kvæðið, so at teir kunna kvøða tað sjálvir, tá ið dansurin aftur um jólini kallar ung og gomul í bygdunum saman, og dansistovurnar hvørt sunnudags- og heilugdagskvøld ímillum jóla og føstu verða nýttar til at sláa ein ring av eini glaðari mannamúgvu, sum hevur sín besta stuttleika í hesi tíðini av kvæðunum, sum upplíva tann gamla dansin."[8]

Og so var í ymsum arbeiði annars. Trivið varð í eitt ørindi ella bæði tvey, meðan spunnið varð, ella eisini tá ið onki serligt var fyri. Bert onkra friðarliga hvíldarløtu.

Tí, ið ikki dansar, kunna kvæðini tykjast drúgv og langrøkjut við mongum uppafturtøkum og við sama niðurlagi ørindi fyri ørindi. Og tí, ið ikki dansar, kann ivaleyst tykjast løgið, at kvøðið verður sama kvæði ferð eftir ferð. Men soleiðis er hin føroyski dansurin. Tað er fyri at kunna gjøgnumliva ta kensluligu gongdina, at so er. Í dansinum kann ikki sigast frá einum veldigum bardaga í tveimum ørindum. Tað verður snópisligt og onki upplivilsi. Kvæðið vil ikki bara siga onkrum, ið onki veit, frá einum stríði í Runsivali, dansifólkið skal uppliva Runsivalsstríðið, og tað gerst ikki í tveimum ella tjúgu ørindum. Øðrvísi er, tá ið ið kvøðið verður, men ikki dansað. Tá verða gjarna ørindir løgd burturúr við vilja, og einans tey bestu kvøðin. Tá er ikki neyðugt at tamba hendingarnar út, tær skula ikki gjøgnumlivast upp á sama máta. Hann ella hon, ið kvøður, velur sær tey mest mergjaðu ella mest hugtakandi ørindini. Ber tað til, verður

---

8 V. U. Hammershaimb: Færøsk Anthologi, København 1891.

niðurlagið stytt, men ikki altíð. Tann, ið situr fyri seg sjálvan og kvøður, hevur ikki fyri neyðini at taka øll einsljóðandi ørindir uppaftur. Men hann kennir tey øll og veit, at tey eru har. Bæði tann, ið soleiðis kvøður, uttan at dansað verður, og tey, ið lurta eftir, hava alla ta ókvødnu restina av kvæðnum í huganum, meðan kvøðið og lurtað verður.

Hetta, at onkur kundi tríva í eitt kvæðaørindi, sum lagið var til, kanska stíga nøkur stev uttan at dansað varð, er tí eisini partur í dansinum og dansitraditiónini. Sitandi kvøðing hongur uppi í dansikvøðing. Tann sanna kensluliga upplivingin er knýtt at dansinum, sitandi kvøðing kallar minnir um hesar upplivingar fram.

## SKIPARIN

Skiparin er høvuðspersónurin í frásøgnini ella rættari framførsluni. Hann byrjar kvæðið ella vísuna, og hann byrjar øll ørindini. Hann setur sín serliga dám á dansin. Hann ger av tempo, hvussu høgt verður kvøðið, um kvøðið verður stillisliga ella harðligari, hann setur sín dramatiska dám á dansin við at brúka allar teir møguleikar, dansurin goymir í sær. Atburður og háttalág við ørmum og kroppi og andlitsbrá hansara hava nógv at siga, fyri at skiparin kann fáa tað rætta sambandið við dansifólkið, so hann fær kvæðið undir fót, frásøgan eydnast og dansurin gongur væl.

Dansifólkið tekur undir við skiparanum, men ansar eftir, at hann sleppur at byrja hvørt ørindi - gevur honum rúmd at skipa kvæðið. Eingin tekur hann av ræði ella tekur kvæðið av honum. Soleiðis er í góðum dansi. Tá ið niðurlagið verður kvøðið, kann skiparin hvíla seg og fyrireika seg til næsta ørindi.

Hetta eru øll samd um, sum dansa, skiparin má fáa náðir at skipa, tað er eyðskilt. Hann er høvuðsmaðurin. Men hvat ger ein góðan skipara? Hann hevur serligan hug og tokka til dans og kvøðing. Tað er eitt. Hann skal hava gott minni, hann skal orka at skipa, og hann skal hava gott lag á kvøðingini. Vakurt, sterkt mál er gott hjá einum skipara at hava, men tað í sær sjálvum er ikki avgerandi fyri, at hann fær dansin at ganga væl. At syngja og kvøða er hvørt sítt.

Ein góður skipari er eisini sjónleikari, tí hann ikki bara kvøður,

hann spælir eisini, hann leggur kenslur í kvøðingina og dugir at vísa tær: hann hevur talent.

Tann veruliga uppgávan hjá skiparanum er at kunna brúka allar teir nógvu skiftandi møguleikarnar, dansurin ber í sær. Hann skal duga at gera tað sjálvur, men enn meira: hann skal geva dansifólkinum og dansiringinum høvi til at brúka hesar møguleikar. Hann skal velja hóskandi tónahædd og kvøða við rættari ferð. Hann skal síðani geva dansiringinum tað temperament, ið hóskar kvæðnum í tí dansinum ta løtuna. Tað er eitt nú í einum longum, dramatiskum kappakvæði ikki at leggja ov ramliga fyri, tí seinni í kvæðinum, tá ið meira ramlig kvøðing veruliga er hóskandi til lag og innihald, so vísir tað seg, at tann møguleikin er uppbrúktur. Ein sorgblíð kærleiksvísa eigur helst ikki at kvøðast, sum var tað bardagin í Runsival.

Ein musikalskur skipari dugir eisini at brúka variatiónirnar í einum kvæðalag og kvøða við skiftandi rødd. Tað lættir í dansinum, ger hann meira hugtakandi og ríkari.

Tað ekspressiva og tað impressiva hava nógv at siga í føroyskum dansi, og tað kann vera ymist, hvussu skiparar og kvøðarar eru í so máta. Summir gera nógv burtur úr høvuðburði, kroppi, ørmum og beinum. Summir hava lyndi til eitt nú at brúka armarnar nógv, aðrir kanska beinini og vilja stíga harðligari. Aðrir dansa og kvøða meira stillisliga, uppá ein impressivan máta. Báðir kvøðararnir kunna vera léttir og livandi og duga væl at fáa dansin at ganga, men við hesum er sum við øllum í føroyskum dansi, tað veldst um samljóðið í ringinum, millum skipara og dansifólk. Dansilagið skiftir bygd úr bygd, so ein stillisligur skipari, ið byrjar eitt kvæði onkustaðni, har dansilagið er meira ekspressivt, ógvuliga væl kann koma so fyri, at hann fær ikki dansin at ganga.

Bæði í dansinum og í kvæðaløgunum eru rúmir karmar fyri variatión, ið hin góði skiparin kann brúka fyri at fáa fram tað hann vil. Og hesir variatiónsmøguleikarnir eru í veruleikanum nógv fleiri, enn dansifólk mangan hugsa um.

## UPPLÆRING

Upplæringin hevði alt at siga - tá sum nú - men enn meira áður, og hon var øðrvísi fyrr. Grundarlagið undir dansilagnum bleiv lagt tíðliga í barnaárunum. Foreldur, ella helst abbar og ommur, tóku barnið á knøini og kvóðu fyri tí, meðan tey tróðu stevið við beinunum, so barnið fekk tað í kroppin, sitandi á knænum.

Í grein síni "Tríggjar føroyskar kvæðakempur" letur Jóannes Patursson tríggjar kvøðarar koma til orða, og allir leggja teir dent á upplæringina í uppvøkstrinum. Tróndur á Trøð í Skálavík (f. 1846) sigur soleiðis:

> "Tíðliga varð eg góður við kvæðir okkara. Tað fyrsta sum eg minnist, var at pápin stóð og spann um vetrarkvøldini og kvað við hørðum og vøkrum máli. Hann var ein rætt kvæðakempa, tiltikin í síni tíð. Í fyrstuni skilti eg lítið, men tað var skjótt, at eg fór at fata, hvat hann kvað um; eg græt tá ið Rólant dragsaði teir deyðu tólvjavningarnar saman á reyðum skildri; men tá ið Dosmar heidningin vágaði sær at taka lúðurin úr hondini á honum, og hann brá tey hálvbrostnu eyguni sundur og gav Dosmari hornið um heysin, so heilin sprongdist út og lá eftir á lúðrinum, tá helt eg tað vera eitt rætt kempubragd, og eg má siga, at eg unti honum tað væl.
>
> So fór eg at ganga í dans, eg var neyvan meira enn átta ár, fyrst við faðir og móður, so við systrunum, og til endan upp á egin hond. Tá gingu gamlir menn í dans, gamlir gubbar við hvítum skeggi, tá var dansur. Tað var ikki eiðasørt, at eg ræddist hesar gamlu risarnar; teir trampaðu í gólvið, armarnar høvdu teir yvir høvdið við hvørt, og so lupu teir undir loftið, eyguni skinu í teim, tað var sum tey høvdu skotið neistar, eg tordi ikki at koma teimum nær. Men tá ið kvæðið var úti, tað kundi hava vart í tímar, tá settust teir niður at pústra, tá sá eg teir vóru blíðir, tá fóru teir at røða um kvæðið, ið kvøðið var, lastaðu tann teir hildu vera last verdan, og rósaðu tí, teir hildu gott um. Teim dámdi væl stór tung høgg, tá ið hvørkin helt skjøldur ella hjálmur og hvør varð høgdur um tvørar herðar og varpaður út á sjó. So sótu teir og geipaðu inntil teir vóru hvíldir, so fóru teir aftur í dansistovudyrnar, var tá eitt kvæðið aftur á gólvinum teim dámdi, so fóru teir uppí aftur dansin.
>
> Eg kundi ikki nógv kvæðir, tó so nógv at eg kvað einki

uppaftur um árið. Pápi mín hevði kunnað nógv meiri, men hann hevði einki uppritað eftir seg, tó lærdi eg fleiri kvæðir av honum. (...) Eg fekk kvæðir hiðan og haðan, eg minnist valla nú, hvat eg havi duga, nú kunna synirnir alt, ið eg kann, sjálvur gloymi eg alt til endan."[9]

Marius Jóanesarson í Funningi (f. 1873) sigur hetta:

"Viðvíkjandi kvæðunum hevði eg at bregða til í báðar ættir. Faðir mín var tiltikin kvæðakempa, móðirin á sama hátt. Abbi mín, Óla Jákup í Katrinarstovu í Funningi hevði eitt stakt gott mál, men kundi ikki so nógv at kvøða, sum faðir. Sum eg skrivaði í Tingakrossi, byrjaðu vit børnini at dansa um sunnudagarnar tá ið komið varð úr kirkju, og vit dansaðu til tey vaksnu komu. Eg kendi straks tá ið eg var í dansi, at fólkið rósti mær, og við tað fekk eg betri hug. Faðir kvað ofta fyri mær, og tað tókti mær væl um; eg helt tað ganga so leingi at læra uttanbókar, so skrivaði eg upp, og eg má siga, at tá ið eg var liðugur at skriva, tá kundi eg tað."[10]

Vanligt var ikki, at børn sluppu upp í ringin, tá ið rættiligur dansur var. Sum Marius Jóanesarson sigur, var tað vanliga, at børnini dansaðu fyri seg, áðrenn tey vaksnu komu í dans. Fleiri heimildir siga frá tí. Har kundu børn og ung, ið høvdu hug at royna seg við tí, tey dugdu, venja seg til vaksnan dans. Heilt eiðasørt var tað tó ikki, at børn vóru uppi í ringinum, men tað mundi vera sjáldsamt, at eitt barn fór upp í ringin einsamalt av sínum eintingum. Hinvegin gjørdu foreldur og onnur oftani tað, at tey tóku børn upp í ringin til sín eina løtu.

Góður føroyskur dansur er høviskligur. Dansað og kvøðið verður í fullum álvara. Eisini, tá ið vísan er skemtilig ella ein táttur verður havdur á gólvi. Fjas og tvætl hoyrdi - og hoyrir - ikki til tann góða føroyska dansin. Við at læra høviskligan atburð í dansinum, lærdi ungdómurin eisini at bera seg høviskliga at annars.

Dansisiðirnir vóru mangir, og sum rímiligt er, nakað skiftandi

9 Jóannes Patursson : Tríggjar føroyskar kvæðakempur. Í: Varðin 4, 1924.

10 Jóannes Patursson : Tríggjar føroyskar kvæðakempur. Í: Varðin 4, 1924.

um landið. Eisini dansilagið var ymiskt, men allastaðni varð dentur lagdur á rættan atburð, ið hoyrdi dansinum til. Skiparin var høvuðspersónurin. Hann átti kvæðið, og tað varð ansað væl eftir at geva honum høvi til at skipa. Tað var ikki væl dámt at fara uppí hjá skiparanum, serstakliga um ein ikki kendi hann, og als ikki, um ein ikki kendi ella dugdi uppi í kvæðnum, hann skipaði. Ein fremmandur kundi bart út spilla dansin og órógva dansilagið.

Hjún dansaðu ofta saman, og tá dansaði konan gjarna framman fyri mannin. Tú bjóðar fólki upp í dansin við at rætta vinstru hond fram móti teimum, og sostatt tekur tey uppí framman fyri teg. Hetta eru tveir av mongum rættiliga føstum siðum.

Til veitslur varð brennivín skonkt, tó ikki sum nú. Skonkjarin stóð altíð við fløskuni í einum horni uttan fyri dansiringin, og teir, ið vildu hava eitt glas, kundu rætta hondina út móti honum. Skonkjarin fór helst ikki inn í ringin, sum nú. Tá sum nú skuldi skonkjarin ansa eftir, at ongin av hansara ávum fekk ov mikið.

Altíð varð dansurin hildin at ganga betur, tá ið konufólk kvað við. Ljósar konufólkarøddir lætta um lagið, og tá ljóðar betur. Og fyrr var vanligari, at konufólk skipaðu. Eisini tey longu, álvarsomu kvæðini, ið mest menn skipa nú á døgum. Nú munurin millum kynini tykist at hava so stóran áhuga í almenna kjakinum, kann vera áhugavert at nevna, at fram ímóti aldarskiftinum seinasta fóru konufólkini so smátt at hvørva burtur úr dansinum, og tá løgdu tær av álvara av at skipa nakað serligt. Hendingaferð hoyrist konufólk skipa nakað av týdningi nú í tíðini.

Ilt er at vita hví, men ivaleyst hevur hetta nakað at gera við tað, at hetta tíðarskeiðið datt hitt vanliga útiarbeiðið hjá konufólki burtur, og teirra arbeiðspláss bleiv meira og meira innanhýsis. Tær fóru so líðandi burtur úr útiarbeiðinum og hvurvu inn um úthurðina til heimið. Dansurin er partur av tí almenna lívinum, og tí hvurvu konufólkini eisini úr dansinum.

## DANSISTOVAN, ALMENNUR DANSUR, DANSIFELØG

Ymsar umstøður skula til, skal dansurin ganga væl, vilja tey flestu halda, tó tað kann vera ymiskt, sum tey leggja dent á. Dansihølið krevur at vera gott, ikki ov stórt og ikki ov høgt millum loft og gólv. Tey flestu munnu vera á einum máli um, at ov stórur dansiringur gevur ringar vónir um góðan dans, og sama er við lítlum ringi í stórum høli.

Dansað varð fyrr inni hjá fólki, sum í dansitíðini lænti eitt rúm í húsunum at dansa í. Dansurin hoyrdi tí til innan fyri somu karmar sum privatlívið, og tað hevur víst seg, at tað fekk avgerandi týdning fyri dansin og dansilívið, at serlig hús blivu bygd at dansa í.

Ikki allar stovur ella øll rúm eru góð at dansa í. Hóast tað, sum Heðin Brú skrivar, oftast ikki var trupult at fáa dansistovu, so vóru tað tó summar stovur, ið vóru betri enn aðrar. Hetta hevur bæði við stødd og skap at gera, og tað hevur nakað við gólvið at gera. Eitt gott dansigólv skal geva seg passaliga, ikki ov nógv og ikki ov lítið.

At hava gjørda dansistovu er nýtt í Føroyum, hon er yvirhøvur komin í okkara øld. Tær fyrstu um aldaskiftið. Tá ið dansurin varð fluttur yvir í tær nýggju dansistovurnar, loystist hann úr sínum privata umhvørvi, og tann rættleiðing, ið hevði verið virkandi áður millum ung og eldri, varð burtur. Tá ið dansað varð undir somu lon og í somu rúmum, sum fólk livdu sítt privata lív, var sjálvsagt, at dansifólkið mátti bera seg at sum inni hjá fólki annars. Í teimum nýggju dansistovunum linkaðust krøvini til sámiligan atburð, og enn meira, tey gomlu fólkini, ið vóru til staðar í teimum gomlu dansistovunum, fóru ikki við yvir í ta nýggju. Jóhan Kallsoy viðger henda spurning í áðurnevndu grein í Varðanum:

> "Tá var tað, ið tikið varð til at byggja dansistovur í einari bygdini fyri og aðrari eftir, og tað er ikki ovmikið sagt, at við teimum nýggju dansistovunum kom hin føroyski dansurin í útlegd. So leingi sum dansurin var knýttur at heiminum, var tað hitt eldra fólkið, ið helt honum strangt innan fyri tað siðiliga og sámuliga mark, ið altíð tørvar, um ein góður gamansleikur ikki skal gerast óflýggjaligur, tí í sjálvt tí lívsfrískasta ungdómi bylgjast altíð kreftir, ið trongja til temjingar."

Slík rættleiðing frá eldri til yngri er avgerandi í allari traditionellari mentan. Tá ið hon er burtur, fer tann traditionella mentanin at liðast sundur. Tað er umráðandi, ikki einans í hesum at dansa, men fyri atburðin í dansinum. Tá ið bæði teir privatu karmarnir vóru burtur og tað natúrliga samskiftið frá eldri til yngri við, so duttu vanligir dansisiðir burtur so líðandi, og eitt nú meira óskettin framferð við brennivíni kom uppí.

Besta dømið er, hvussu dansurin mangan plagdi at ganga í Sjónleikarhúsinum í Havn eitt vanligt dansikvøld. Hølið var so stórt, at skiparin mátti rópa, um øll skuldu hoyra, og ringurin so stórur, at mangan var stevið ymist í hvør sínum enda á hølinum. Ikki sjáldan vavdist alt so saman, at fólkið dansaði í fleiri ringum, men allar ringast var, tá ið fleiri kvæðir kundu verða skipað í senn. Tá ið eitt kvæðið var av, hendi tað seg, at tveir og onkuntíð tríggir við byrjaðu í senn - hvør sítt kvæði sjálvsagt - kappaðust so eina løtu, fyri at vita, hvør vann, og stóð heilt illa til, vildi ongin víkja. Tað kundi henda seg, at fleiri hundrað fólk vóru í ringinum, at ov mikið av brennivíni var uppií, so at í Sjónleikarhúsinum var stundum sera lítið høpi í.

Nú hetta verður skrivað, nú ið nærkast aldamótinum, er støðan aftur ein onnur. Dansurin er aftur horvin úr dansistovum og bygdarhúsum, úr fullum almennum umhvørvi, og er at finna í feløgum og teimum hálvalmennu hølum, hesi feløg dansa í. Harvið er aftur eitt eftirlit komið upp í, so at dansurin ikki longur er ótálmaður. "Niðurgangstíðin" og kjakið um góðan og ringan føroyskan dans hava í dag ført til eina vanliga hugsan hjá dansifólki um hin "rætta" føroyska dansin. Tað er ivaleyst gott, at so er vorðið, men kjakið um "rætt" og "skeivt" í dansi førir stundum við sær, at variatión og skiftandi dansilag verða mett eftir hesi hugsan um, hvat er"rætt" og "skeivt", og førir í okkara tíð á ta leið, at dansurin missir síni bygdaeyðkennir. Á somu leið føra eisini bandupptøkur og plátur, ið vísa seg at køva mong eyðkennir við dansilag og kvøðing. Enn eitt kann nevnast í hesum viðfangi, at fólk ikki longur tykjast at kenna nóg væl mun millum at syngja og kvøða.

## SAMANFATING

Hesin partur er ein stutt lýsing av dansi og kvøðing sum traditión, sum kommunikatión, sum skapandi samvera og mentanarbundin formur.

Tá ið talan er um alment skipaða kunning og undirvísing í kvøðing og dansi, vil nevndin leggja dent á, at talan er um mentanarlig traditiónsfyribrigdir og ikki einhvønn førleika, ið bara kann lærast eftir ásettum reglum. Tað er tí meira áhugi, innlivan og dansihøvir enn krøv og undirvísing á skúlabonki, ið krevjast fyri at røkka fram móti tí máli, arbeiðssetningurin, nevndin hevur fingið, ásetur.

Dansur og kvøðing vóru partar av mentanarlívinum hjá føroyingum. Støðan er ikki soleiðis nú í sama mun sum fyrr, og endamálið við at taka hesi evnir upp á skipaðan hátt í fólkaskúlanum, er á tann hátt at medvirka til at "kvæði og føroyski dansurin aftur verða ein sjálvsagdur táttur í mentunarlívi okkara," sum arbeiðssetningurin hjá nevndini sigur.

Nevndin heldur, at endamálið við ábótarætlanini er at styrkja, menna og kveikja ans hjá børnum og ungum fyri føroyskum dansi:

1. har dansað verður,
2. tá ið dansað verður, og
3. sjálv at hava føroyskan dans sum part av egnum mentanarligum førningi.

Í hesum liggur eisini, at tað er ikki innan skúlans karmar, dansurin skal liva og virka, men í allari mentanarligari samveru. Endamálið við tiltakinum er tí ikki at trýsta allar skúlanæmingar at dansa eftir kravi frá lærarum og skúlamyndugleikum, men at skúlin leggur sín part av hesi mentan niður í børnini, sum tey áður fingu í natúrligari samveru í uppvøkstrinum.

Undirvísing í dansi og kvøðing kann tí bara skipast í samstarvi millum skúla og dansifólk, har skúlans partur er at leggja eina grund og birta uppundir.

Tað er lættari at køva og byggja óneyðugar forðingar við óhóskandi krøvum og tyngjandi talu um fedraarv og mentanarligar skyldur enn at kveikja og birta uppundir.

# Kanning um dans og kvæðir í skúlanum

Hóast nógv hevur verið tosað, hevur føroyskur dansur enn ongantíð alment fingið innivist í skúlanum, men í nógvum skúlum hevur verið siður, at børnini eru farin upp á gólv við summi høvir - tó ikki sum lærugrein. Í teimum smærru bygdaskúlunum hevur mangastaðni verið vanligt, at børnini hava dansað í eitt nú skúlagongini, tá ið høvi var til tað. Hetta hevur oftast verið ein spurningur um, hvussu stóran hug lærarin hevði.

Til at fáa eina hylling á, hvussu støðan viðvíkjandi dansi er í skúlanum beint nú, sendi nevndin eitt spurnarblað til allar skúlar í Føroyum, har høvuðsspurningarnir eru, um dansað verður í skúlanum sum er, og um dansur verður mettur sum ein partur av undirvísingini, um metingar hjá skúla, skúlanevndum og foreldrum viðvíkjandi dansi í skúlunum, og um kvæðir og dansiskaldskap í undirvísingini. Somuleiðis varð spurt um áhugan hjá skúlanæmingum og lærarum fyri kvæðum og dansi í undirvísingini.

15 skúlar svara, at børnini fara upp á gólv í tímunum, og at dansur kann sigast at vera ein partur av undirvísingini. 5 skúlar svara harumframt, at børnini stundum dansa í fríkorterunum. Hinvegin upplýsa 14 skúlar, at har fara børnini ongantíð upp á gólv í tímunum, og at dansur bert tilvildarliga kemur inn sum partur av undirvísingini. 23 skúlar svara, at har verður ongantíð dansað í fríkorterunum, og 3 svara bart nei, at dansur er partur av undirvísingini.

21 skúlar nevna føroyskt sum ta lærugrein, har dansur mest kemur fyri, 3 skúlar nevna søgu, 2 nevna sang, og ein nevnir skriving. Ein skúli nevnir, at dansur verður brúktur í flokstímanum, og ein nevnir dans sum

serstakt evni. At enda nevnir ein skúli, at dansur kemur fyri í fleiri lærugreinum.

Um áhuga millum lærararnar, halda 8 skúlar, at ein ávísur áhugi er yvirhøvur millum lærararnar, 11 nevna einstakar lærarar sum áhugaðar.

Ein brennandi spurningur hevur verið mótstøðan móti føroyskum dansi í sambandi við skúlan, men hevur hetta einaferð verið so, tykist henda mótstøða ikki so sterk longur. Bert 4 skúlar meta ikki, at tað ber til at dansa á skúlans vígda øki, 24 svara, at tað ber væl til. Á sama bógv bendir tað, at 24 skúlar svara, at mótstøða valla hevði verið móti dansi í skúlanum frá foreldrum, lærarum, skúlanevnd ella bygdarfólki yvirhøvur. 3 svara ja til henda spurning.

Spurt varð eisini um kvæðini einsamøll í hesum høpi. Lesiætlanin ásetur kvæðir sum ein part av undirvísingini í føroyskum, og 24 skúlar svara eisini, at kvæðir eru ein partur av undirvísingini. Óvæntað svara 5 nei til henda spurning. Meira áhugavert er tað kanska, at í 21 skúlum verður svarað, at børnini verða kravd at læra seg kvæðir uttanat. Her svara 8 nei. Uttanatslæra er ikki kravd í lesiætlanini, men er sjálvsagt neyðug fyri at kunna kvøða.

At enda varð fregnast eftir teimum royndum, skúlarnir høvdu við áhuganum hjá næmingunum fyri kvæðum og dansi. Her svara allir, at áhugin er nógv størstur hjá teimum yngru børnunum, og at hann minkar, tá ið tey vaksa til, og oftast fánar heilt burtur. Tó nevna nakrir skúlar, at hann stundum sæst kykna aftur í 9. og 10. flokki. Á næstu síðu verða endurgivnir teir flestu spurningarnir í blaðnum, og hvussu svarað varð.

SPURNARBLAÐIÐ

1. Fara børnini upp á gólv í skúlanum?

| | |
|---|---|
| Í tímunum? | Ja: 15 |
| | Nei, ongantíð: 14 |
| Í fríkorterinum? | Ja: 5 |
| | Nei, ongantíð: 23 |

2. Kann føroyskur dansur sigast at vera partur av frálæruni, ella verður farið upp á gólv tilvildarliga, tá ið høvi býðst?

Partur av frálæruni: 15
Tilvildarliga: 14
Ikki: 3

3. Fara børnini upp á gólv av sínum eintingum ella einans, tá ið fyriskipað verður?

Av sínum eintingum: 2
Fyriskipað: 21
Ikki: 1

4. Verður tað í tykkara føri mett at bera til at dansa føroyskan dans á skúlans vígda øki?

Ja: 24
Nei: 4

5. Um ikki, hvør sýtir?

Lærararnir samdir: 2

6. Um ikki, er tá annað stað, har dansað verður/kann verða?

Bygdarhús o.t.: 6
Onki stað: 3

7. Um dansur kann sigast at vera partur av frálæruni, í hvørjum lærugreinum verður hann nýttur?

Føroyskum: 21
Søgu: 3
Skriving:1
Sangi: 2
Flokstími: 1
Serstakt evni: 1
Í fleiri: 1

8. Er annars áhugi millum lærarar fyri at taka hetta evnið meira upp í frálæruna?

Yvirhøvur: 8
Einstakar lærarar: 10
Millum fleiri: 1

9. Halda tygum, at mótstøða kundi tikið seg upp, um dansur á ein ella annan hátt kom við í frálæruna? Frá foreldrunum, bygdarfólkinum, skúlanevndini, lærarunum ella øðrum?

Nei: 24
Ja: 3

11. Verða kvæðir regluliga gjøgnumgingin í frálæruni?

Ja: 24
Nei: 5

13. Verða næmingarnir bidnir um/kravdir at læra seg kvæðir uttanat?

Ja: 21
Nei: 8

# Tilmæli

Tað er ein sannroynd, at børnum dámar sera væl at dansa og kvøða, og nevndin mælir til, at føroyskur dansur og kvøðing verður obligatoriskt undirvísingarevni í fólkaskúlanum ájavnt við tey evnir, nevnd verða í grein 11 í løgtingslógini um fólkaskúlan (løgtingslóg nr. 21 frá 22. mars 1979), at hesin táttur verður styrktur á pedagogisku stovnunum fyri børn undir skúlaaldur og at dansur og kvøðing verður kravdur táttur í lærara- og pedagogútbúgvingini í Føroyum.

Hinvegin mælir nevndin ikki til at skipa dans og kvøðing sum egna lærugrein í fólkaskúlanum, men at hetta verður kravdur partur av undirvísingini á øðrum økjum.

Grundsjónarmiðini hjá nevndini eru, at undirvísingin í fólkaskúlanum eigur at stuðla upp undir dansigleði á ein slíkan hátt, at hon ikki verður køvd av krøvum og formligum endamálsorðingum.

Kvæðadansurin er serføroysk mentanartraditión, ið hevur livað og lagað seg í brúki og ikki av reglum og fyriskipanum. Ymiskt dansilag hevur verið í bygdunum, og er tað partvíst enn. Hóast viðurskiftini í dag, m.a. við øktari samferðslu og við fjølmiðlunum, sum regluliga gera upptøkur og hava dans og kvøðing á sendiskránni, virka á tann bógvin, at dansilagið og kvøðingin laga seg til meira eintáttaðar formar við somu fyrimyndum, vil nevndin leggja dent á, at upplæringin serstakliga fer fram í tilknýti til tann dans og tað dansilag, ið er eyðkent á staðnum, børnini búgva. Her mælir nevndin tí til, at undirvísingin verður skipað í samstarvi við dansarar og/ella dansifeløg, ið skula leggja børnunum lag á sjálvan dansin. Tað er umráðandi, at skúlin ikki fremur tillagaða dansiundirvísing eftir formligum fyriskipanum um "rætt" og "skeivt", men at næmingarnir fáa grundleggjandi fatan av variatión og frábrigdum, sum grundarlag undir livandi dansi.

Í tí at dansur og kvøðing ikki eiga at skipast sum egin lærugrein liggur, at skúlin heldur ikki eigur at seta ávís kunnleikakrøv, sum í øðrum

lærugreinum, ið skula kunna metast, tá ið skúlaárið/skúlatíðin er av. Endamálið við skúlans arbeiði við dansi og kvøðing skal ikki vera, at gera øll børn til dansarar og kvøðarar, men at leggja eina grundleggjandi vitan um evnið, ið tey sjálv eftir áhuga kunna byggja á.

Hinvegin er eyðvitað neyðugt, at næmingarnir vita og læra nakað, fyri yvirhøvur at kunna fara upp á gólv. Greint verður nærri frá sjónarmiðum um kunnleika og førleika niðanfyri.

## KRØV TIL UNDIRVÍSINGINA

Høvuðsætlanin við evninum "dansur og kvøðing í fólkaskúlanum" er, sum nevnt, at stuðla og byggja upp undir ta dansigleði, øll børn hava. Hetta merkir, at:

1. Allir næmingar fáa grundleggjandi hylling á dansi og kvøðing.
2. Allir næmingar skula læra stev so tíðliga sum til ber.
3. Allir næmingar skula læra nakrar tekstir uttanat.
4. Allir næmingar eiga at hava verið uppi á gólvi og dansað í minsta lagi einar tvær ferðir hvørt skúlaár.
5. Teir næmingar, ið hava hug og evnir, skula fáa høvi til at skipa í dansi í skúlanum.
6. Nevndin mælir til, at undirvísingin, so vítt gjørligt, verður skipað í samlag við dansifeløg ella dansarar og allarhelst við barnadans uttan fyri skúlan.

### 1. HYLLING Á DANSI OG KVØÐING

Hetta er høvuðssetningurin við evninum "dansur og kvøðing í fólkaskúlanum". Næmingurin í føroyska fólkaskúlanum skal hava fingið eina grundleggjandi kunning um hin føroyska kvæðadansin og um kvæða- og vísuskaldskapin sum annað og meira enn bara bókmentir.

Ein og hvør næmingur í fólkaskúlanum skal kunna fara upp í ein dansiring, og ein og hvør næmingur skal duga nakað at kvøða.

Næmingarnir skula fáa hylling á muninum millum kvøðing og

sang og annan tónleik.

Næmingarnir skula fáa innlit í dansitraditiónina sum mentanarform, dansisiðir og dansilag.

Ein aðaltáttur í undirvísingini verður at fáa næmingarnar at skilja hugtakið variatión sum berandi í dansinum, og at dansilagið er ymiskt.

2. DUGA STEV

Næmingarnir í fólkaskúlanum skula so tíðliga sum til ber læra stev, t.e. duga at stíga í einum dansiringi.

3. UTTANATSLÆRA

Skal føroyskur dansur treðast, muga fólk duga at kvøða uttanat, og nevndin mælir til, at allir næmingar skula duga nakað at kvøða uttanat. Tað, ið lært verður, skal laga seg eftir aldrinum. Skúlin skal standa fyri hesi uttanatslæru.

Tey yngru eiga at læra stuttar yrkingar, so sum skjaldur, rím og stuttar vísur. Sum dømir kunna nevnast At telja jólini, Øskudólgur og sópingarkona, Blankans ríma, Ólavur Riddararós, Torkils døtur og annað.

Tey eldru skula hava lært minst tvey miðallong kvæðir uttanat, tá ið tey fara úr sjeynda flokki.

4 OG 5. UPP Á GÓLV

Skúlin skipar fyri føroyskum dansi í ávísan mun, soleiðis at allir flokkar fara upp á gólv í minsta lagi tvær ferðir hvørt skúlaár. Næmingarnir skula sjálvir skipa í dansinum. Allir næmingar í einum flokki, ið hava hug og evnir skula fáa høvi at skipa minst tvær ferðir hvørt skúlaár, eisini um hetta krevur, at farið verður fleiri enn tvær ferðir upp á gólv.

Í hesum sum í øðrum eigur arbeiðið við kvøðing og dansi at laga seg eftir umstøðum og huga, so at skúlin má finna formar, ið hóska. Fleiri flokkar kunna t.d. dansa saman, og nevndin leggur dent á, at um til ber, eiga næmingar á fleiri aldursstigum at dansa saman. Ofta hava yngri børn fragd av at dansa saman við eldri.

6. BARNADANSUR OG TVÍBÝTT UNDIRVÍSING

Tað er ikki tankin, at skúlin skal "útbúgva dansarar", men hann skal leggja eitt grundarlag í vitan og førleika at byggja á. Nevndin metir tað vera eina avgerandi fyritreyt fyri at lúka endamálið við arbeiðnum, at allir næmingar skula hava høvi til at dansa føroyskan dans.

Skúlamyndugleikarnir eiga at skapa møguleikar fyri, at barnadansur verður skipaður um alt landið, og at undirvísingin í fólkaskúlanum og barnadansurin verða samskipað og lagað hvørt at øðrum. Onki barn skal verða kravt at ganga í dans av skúlanum, men hann skal birta upp undir hugin og mæla til.

Sum nevnt verður skipað fyri barnadansi ymsastaðni, men ov fáa staðni. Nevndin mælir til eina fasta skipan í t.d. dansitíðini. Har barnadansur er, verður hann skipaður av sjálvbodnum við serligum áhuga. Hetta er gott, men fyri at fáa barnadansin allastaðni mælir nevndin til samstarv millum skúlamyndugleikar og dansifeløg ella onnur áhugað fólk, og at tey, ið gera hetta arbeiði, verða lønt. Tástaðni fæst vissa fyri, at dansað verður, og tástaðni kunna krøv verða sett til báðar partar, dansinum at frama.

## FØROYSKUR DANSUR Í UNDIRVÍSINGINI

Dansur og kvøðing kann og eigur at lagast til undirvísingina í fleiri lærugreinum. Hesum mugu lærararnir og skúlin skipa fyri eftir umstøðunum. Hugsandi er hetta vælegnað evni í føroyskum, søgu, sangi, ítrótt, heimstaðarlæru og skriving. Dansispøl hóska væl til ítrótt. Kvøðing og dansur eigur at vera ein natúrligur partur av undirvísingini í sangi og tónleiki. Tekstir hoyra sjálvsagt til sum partur av undirvísingini í føroyskum og somuleiðis sum skrivivenjingar. Í heimstaðarlæru og søgu/samtíð skuldi hetta evni verið væl hóskiligt.

Sum longu verður gjørt í summum skúlum, eigur at verða skipað fyri føroyskum dansi til skúlasamkomur og framsýningar. Á jólum og føstulávint eru hóskandi høvir ella við skúlaársenda. Um ongar slíkar samkomur eru, eigur at vera skipað fyri teimum.

Eitt hugskot er, at lata flokkar úr ymsum skúlum seta hvørjum øðrum dansistevnu og avtala, hvat kvøðast skal.

Í dansitíðini samstarva skúlin og dansifelagið/tey, ið skipa fyri barnadansinum. Tað, sum børnini læra/hava fyri í skúlanum, verður kvøðið í dansinum, og lærarar og dansarar samráðast um, hvussu lagt verður til rættis. Tað kann vera væl hóskandi tiltak, at barnadansiringar vitja hvønn annan til dansistevnu.

## ÁBYRGD OG SKIPAN

Nevndin mælir ikki til at skipa føroyskan dans sum egna lærugrein, men vil leggja allan dentin á, at dansur kortini verður sjálvstøðugt undirvísingarevni, ið ikki skal kunna detta burtur ímillum.

Tí er neyðugt, at dansur fær sítt skipaða ábyrgdarøki sum eitt og hvørt annað undirvísingarevni í skúlanum (sbr. grein 11 í lóg um fólkaskúlan), soleiðis at ansast kann eftir, at undirvísingarevnið verður tikið í fullum álvara. Skúlamyndugleikin skal bæði síggja til, at tað neyðuga arbeiðið verður gjørt í øllum skúlum og hava ábyrgd av samstarvinum við dansifeløg ella tey, ið skipa fyri barnadansinum uttan fyri skúlan.

## FÍGGJARKRØV

Hóast sjálvbodna arbeiðið við barnadansi í summum førum virkar væl, er hetta bert í nøkrum fáum støðum, og fyri at øll børn skula hava tilboðið, krevjast tiltøk. Fyri at henda skipanin við dansi uttan fyri skúlan skal kunna skipast á tryggum støði og tann myndugleiki, ið hevur ábyrgd av undirvísingini, skal kunna seta krøv til arbeiðið, eigur hetta at vera lønt og somuleiðis neyðugar útreiðslur at kunna gjaldast, hølir o.t. Arbeiðið eigur at verða gjørt eftir fastari avtalu.

Skúlamyndugleikarnir eiga at finna útvegir fyri hesum útreiðslum. Í tí sambandi vil nevndin vísa á løgtingslóg nr. 70 frá 30. juni 1983 um frítíðarundirvísing vm., 4 tátt, grein 11: Frítíðarvirksemi.

## LÆRARARNIR

Nevndini er greitt, at tað mangastaðni kann vera trupult at finna lærarar, ið vilja og kunna átaka sær arbeiðið við føroyskum dansi. Serliga við teir smærru skúlarnar.

Í summum førum kann skúlin fáa lønta hjálp uttanífrá. Serliga í skúlum í smáum bygdum mælir nevndin til at finna onkra skipan, ið hóskar á staðnum.

Sum frá líður eigur hesin trupulleikin ikki at vera so stórur, tí sum partur av hesum arbeiði eigur eisini dansur at gerast kravt evni í læraraútbúgvingini, har dansur higartil hevur verið skipaður sum frítt valt tilboð uttan fyri skúlaarbeiðið.

# UPPÍSKOYTI

## 1. HUGSKOT TIL KVÆÐIR, VÍSUR, TÆTTIR, RÍMUR O.T. ID KANN HÓSKA HJÁ NÆMINGUM.

RÍMUR OG RAMSUR.

At telja jólini
- Mær gav Sankta Mortan
- Stat op Sankta Simeon
- I lade mig le en liden stund

Øskudólgur og sópingarkona
Húgvutáttur
Kall og Svein ungi
Frísa vísa

DANSISPØL

Kráka situr á steini
Sema sema manema
Ríða ediling
Bandadans
Gomlu ketu
Sandoyardans
Slippudans
Hálendarin
Tvey innaní
Fýra innaní.

LÆTTAR VÍSUR

Blankans ríma
Ólavur Riddararós
Jákupsa skegg
Trillemand
En gang det sig monne hænde
Her nógv er at gera
Nú gerast kvøldini myrk og long
Huldugentan
Lýð á ljóðið
Hin føroyski dansurin

NAKRIR TÆTTIR

Falkaríman
Vatntátturin
Ole Morske
Sambandsfallið

KVÆÐIR OG VÍSUR

Harpu ríma
Torkils døtur
Flóvin Bænadiktsson
Sigmunds kvæði
Hr. Sinklar
Brestis kvæði
Gudbrands kvæði
Leivs kvæði
Ormurin langi
Harra Pætur og Elinborg
Der går dans på Riber gade
Bøhmerlandsdronningen
Vågen

2. FØROYSKIR SANGIR YRKTIR TIL KVÆÐALØG

Frægir funnu Føroya land/J. H. O. Djurhuus
Lag: Óluvu kvæði.
*Niðurlag: Stígum fast á várt gólv...*

Kærleiki til fosturjørð/Andr. Sámalsson
Lag: Sjúrðar kvæði
*Niðurlag: Grani bar gullið av heiði...*

Kom upp á fjallatind/M. á Ryggi
Lag: Norska løva

Navnið eitt av øllum ber/Símun av Skarði
Lag: Óluvu kvæði
*Niðurlag: Stígum fast á várt gólv...*

Við Kaspiska havið/J. P. Gregoriussen
Lag:

Í túsund á og meira aftrat/J. Patursson
*Niðurlag: So herlig og so væl / og der udi trode*

So harður er streymur/J. P. Gregoriussen
Lag: Óla Hvass
*Niðurlag: Út í byrginum strýkur...*

Vælkomnir føroyingar her í vási/J. Patursson
Lag: Kom venner lader os betragte...

Eg veit ein kvist/J. Patursson
Lag: Ebbe Skammelsen
*Niðurlag: Fordi drog Ebbe Skammelsen...*

Risin kjósaði sær eitt vív/S. M. Zachariassen
Lag: Sjúrðar kvæði
*Niðurlag: Grani bar gullið av heiði...*

Tit gevið mær ljóð/J. Patursson
Lag: Det er nu sket udi vor tid...
*Niðurlag: So herlig og so væl...*

Í Vesturhavi/S. M. Zachariassen
Lag: Det er nu sket udi vor tid...
*Niðurlag: Sår er min hånd af den brynje*

Heilir og sælir tit føroyingar/J. Dahl
Lag: Sjúrðar kvæði
*Niðurlag: Grani bar gullið av heiði...*

Lat birtast upp eina gleðisstund/J. Dahl
Lag: Blankans ríma
*Niðurlag: Hitt vænasta vív ið vinnast má*

Fremji ring eftir gólvi fram/J. Dahl
Lag: Fuglakvæðið
*Niðurlag: Fuglin í fjøruni / við sínum nevi reyða...*

Úr trøllamyrkri í morgunroða/H. A. Djurhuus
Lag: Vælkomnir føroyingar

Dagur dettur av degi/J. Patursson
Lag: Súsonnu vísa

Stígum sterkir og stígum við hógv/J. Patursson
Lag: Svend Vonved
*Niðurlag: Se dig ud Svend Vonved*

Fylkist nú føroyingar saman í bólk/J. Patursson
Lag: Guttorms vísa
*Niðurlag: Allar vakrasta, kjerasta mín...*

Upp at stríðast, Skortlands menn/J. Patursson
Lag: Ormurin langi
*Niðurlag: Glymur dansur í høll...*

Í Kirkjubø ein skúli stóð/J. P. Gregoriussen
Lag: Herr Sinklar
*Niðurlag: Vel op før dag...*

Og tað var Magnus Heinason/S. av Skarði
Lag: Stærke Tidrik
*Niðurlag: Nu stander strid / norden under Jylland*

Tíðin dvølist ikki við/S. M. Zachariassen
Lag: Óluvu kvæði
*Niðurlag: Stígum fast á várt gólv...*

Fagurt sól í Føroyum rann/J. Patursson
Lag: Grettirs kvæði
*Niðurlag: Nú fellur ríman...*

Vensil legði at Føroya landi/J. Patursson
Lag: Grettirs kvæði
*Niðurlag: Nú fellur ríman...*

Løgmaður átti so góðan ein garð/M. á Ryggi
Lag: Veturin kom við kulda og kava

Gongur so í hesum heimi/S. av Skarði
Lag: Sjúrðar kvæði
*Niðurlag: Grani bar gullið av heiði...*

Nú tøkk vit tær siga fyri títt stríð/S. M. Zazhariasen
Lag: Det er nu sket udi vor tid...
*Niðurlag: Sår er min hånd af den brynje.*

Mangur fór mætur av landi út/J. H. O. Djurhuus
Lag: Ormurin langi
*Niðurlag: Glymur dansur í høll...*

Tú kveikti eld í faðir mín/Regin Dahl
Lag: Grettirs kvæði
*Niðurlag: Nú fellur ríman...*

Halt út, halt út á hav/M. á Ryggi
Lag: Vind op, vind op i rå...

Teir sigla so væl sín fríða knørr/H. A. Djurhuus
Lag: Kongens søn af Engeland
*Niðurlag: Men børen blæser....*

Fagur er morgunin, sólin sær/M. á Ryggi
Lag: Veturin kom við kulda og kava...

Erla kongsdóttir komin er/M. á Ryggi
Lag: Veturin kom við kulda og kava

Tað lýsir um fløtur/M. á Ryggi
Lag: Vi hugge med kårde

Komið børn og berið hoyggj/S. av Skarði
Lag: Svend Vonved
*Niðurlag: Se dig ud Svend Vonved*
Og hygg nú í garðin/S. av Skarði
Lag: Vi hugge med kårde
Nú Føroyar farvæl/Hjalmar Hammershaimb
Lag: Í Gøtu ein dag
Føroyingar sum her nú koma saman/
R. Effersøe
Løgd eru tún á gøtum sløttum/J. Patursson
Veturin kom við kulda og kava
Tað hevur tókt/J. Patursson
Unglingar sum fylkjast her/J. Patursson
Lag: Kjartan Ólason
*Niðurlag:Leggið nýggjar árar út...*
Norðanættin rann av reystum grundum/
Poul F. Joensen
Lag: Føroyingar sum her nú koma saman
Í Føroyum er hart um vetrartíð/
J. P. Gregoriussen
Lag: Det er nu sket udi vor tid...
*Niðurlag: Sår er min hånd af den brynje.*

Tað frættist nú og fregnast/J. Patursson
Lag: Brynnings vísa
Her nógv er at gera/J. P. Gregoriussen
Lag: En deijlig ung ridder
Harðliga hann ríður fram/M. á Ryggi
Lag: Sjúrðar kvæði
*Niðurlag: Grani bar gullið av heiði...*
Eina so vil eg vísuna kvøða/E. Lützen
Lag: Fruntatáttur
Meg droymdi ein so sáran dreym/
J. H. O. Djurhuus
Lag: Årle om morgenen lærken sang
*Niðurlag: Under så grøn en lide / Kongen af Danmark lader det hævne*
Í Gøtu ein dag/Tróndur Olsen
Eg gekk mær ein dagin á bøin út/Poul Klein
Lag: Brúðarvísan